# Rækju-vinnan hjálp-ast

**Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Johan Dahl, hevur sett ein skjóttarbeiðandi bólk at viðgera kreppuraktu rækjuvinnuna. Týsdagin var Fiskimálaráðharrin á fundi við grønlenska Fiskimálaráðharran, Simon Olsen**

RÆKJUVINNAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Johan Dahl, hevur sett ein bólk at viðgera kreppuraktu rækjuvinnuna. Bólkurin skal millum anna viðgera, hvørjar møguleikar vinnan hevur at reisa seg aftur.

Bólkurin er mannaður av serfrøðingum, umboð fyri vinnuna, fyrisitingini, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag. Landsstýrismaður hevur givið bólkinum ein mánað at gera eina frágreiðing um støðuna í rækjuvinnuni.

### Fundur í Keypmannahavn

Í gjár skuldi Johan Dahl hitta grønlendska Fiskimálaráðharran, Simon Olsen, í Keypmannahavn. Føroyingar og grønlendingar eru á einum máli um, at fiskivinnusamstarvið millum londini skal styrkjast.

Sum liður í hesum arbeiði, skuldu landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hitta grønlendska starvsbróður sín um útlitini fyri øktum samstarvi millum londini í framtíðini.



*Umboðið fyri tónleikararnir í Havn, sum vilja hava spælistað, Rógvi á Rógvu, heldur ikki, at Tórshavnar býráð veruliga hevur nakra ætlan við tónleikinum í høvuðsstaðnum.*

*Mynd: Savnsmynd*

# Tónleikarar fyri vanbýti

**Hóast lyfti frá Tórshavnar býráð um spælistað á Gamla vaskarínum, fáa tónleikararnir í høvuðsstaðnum kortini ikki bygningin í Tórsgøtu. Umboðið fyri tónleikararnar, Rógvi á Rógvi, tekur ikki Tórshavnar býráð fyri fult longur. Formaðurin í mentanarnevndini, Heðin Mortensen, sigur, at tað var eitt mistak at geva tónleikararunum lyftið um Gamla vaskaríið**

TÓNLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað var ein bragdligur borgarstjóri í Havn, sum í Sjónvarpi Føroya í heyst kundi boða tónleikararunum í høvuðstaðnum, at teir endiliga skuldu fáa eitt spælistað. Jan Christiansen greiddi sjónvarpshyggjarunum at Tórshavnar býráð hevði gjørt av, at Gamla vaskaríið skuldi í framtíðin hýsa tónleikararunum í Havn.

Hetta vóru bjørt tíðindi fyri tónleikarar í Havn, sum fleiri ferðir hava víst sína ónøgd við, at einki spælistað hevur verið í Havn, síðan Perlan, fyrst í áttatiárunum, varð tikin niður.

Nú fáar mánaðir seinni er kortini vent í holini. Lyftið um Gamla vaskaríið er longu brotið. Tórshavnar býráð hevur slept ætlaninum um Gamla vaskaríið og vil nú hýsa tónleikarunum í hølunum undir Snarskivuni. Hesa avgerð eru tónleikararnir alt annað enn fegnir um.

Rógvi á Rógvu hevur verið sera virkin í arbeiðinum við at tryggja tónleikararunum í høvuðsstaðnum betri kor og hann sigur, at hann er givin við at taka Tórshavnar býráð fyri fult.

### Altíð lappaloysnir

Rógvi á Rógvu er vónbrotin og sigur seg vera alt meira sannførdan um, at býráðspolitikkararnir í Havn ikki hava nakra veruliga ætlan við tónleikaumhvørvinum í Havn.

Hann vísir á, at Tórshavnar býráð heldur á við at fremja lappaloysnir, heldur enn at arbeiða miðvíst ímóti eini varandi loysn, sum tónleikararnir í høvuðsstaðnum kunnu taka undir við.

– Eg havi hoyrt, at hølini undir Snarskivuni eisini skulu nýtast sum danistað fyri ung og kafeteria hjá sosialu deild. Eftir øllum at døma ætla mann so bara at putta tónleikararnar inn í somu hølir og tað er púra óskiljandi, tí hetta loysir avgjørt ikki okkara tørv á einum spælistaði í Havn, sigur Rógvi á Rógvu.

Hann leggur dent á, at tónleikararnir ynskja eitt veruligt spælistað, har tónleikurin einsamallur verður settur í hásæti. Kortini rína hesi ynski ikki við hjá býráðspolitikkarunum í Havn og tónleikararnir eru við at ótolnast.

– Vit fingu játtað 250.000 krónur á fíggjarlógini, men tað røkkur kanska ikki meir enn til nakrar stólar í einum spælistað, greiðir Rógvi á Rógvu frá.

### Brúka býráðsvalið

Seinni í ár verður kommunuval kring landið og hesum ætla tónleikararnir at gera sær dælt av. Undir valstríðnum til løgtingsvalið 20.januar vóru tað fleiri valevni, sum søgdu seg vilja stuðla tónleikinum, um tey vórðu vald.

Um somu valagn verða nýtt á kommunuvalinum er ilt at meta um, men Rógvi á Rógvu sigur, at tónleikararnir í høvuðsstaðnum ætla at spyrja uppstillaðu flokkarnar, um ein atkvøða fyri flokkinum verður ein atkvøða fyri betri korum fyri tónleikin í Havn.

### Eitt mistak

Formaðurin í mentanarnevndini í Tórshavnar býráð, Heðin Mortensen, sigur tað var eitt mistak, at tónleikararnir fingu at vita, at teir alt fyri eitt fingu Gamla vaskaríið.

– Gamla vaskaríið er í alt ov ringum standi til at gerast spælistað í løtuni. Nógv fleiri pengar skulu til, áðrenn Gamla vaskaríið kann nýtast. Tað var tí skeivt, at tónleikararnir fingu at vita, at teir sluppu inn í Gamla vaskaríið, sigur Heðin Mortensen

Hann leggur afturat, at ætlanin er at endurreisa Gamla vaskaríið til eitt mentanarhús í Havn og tá kann væl koma upp á tal, at tónleikararnir fáa innivist har.

– Endurreisnin skal gerast eftir sama leisti, sum við Müllers Pakkhúsi. Eg meti tað fer at kosta eini 6-7 mio. krónur at gera Gamla vaskaríð til eitt vælútbygt mentanarhús, sigur Heðin Mortensen.

Leisturin, sum Heðin Mortensen sipar er, at Tórshavnar býráð endurreisir Gamla vaskaríð í stigum og játtar pening hvørt ár á fíggjarlógini til byggingina. Hesin leistur verður nýttur í samband við byggingina av Müllers Pakkhúsi.



Niclas Foldbo var byggileiðari, tá Vágatunnilin varð bygdur:

# Tilfarið undir Leirvíksfirði er gott

**Sambært teimum forkanningum, sum gjørdar eru og við góða tilfarinum, sum maskinan nú borar seg ígjøgnum í huga, væntar Niclas Foldbo, verkfrøðingur, sum hevur verið byggileiðari í sjey tunnilsbyggingum, at góða "driftin", sum nú er, fer at halda fram, til komið er um Leirvíksfjørð**

TUNNILSBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Niclas Foldbo, verkfrøðingur, hevur góðar vónir um, at verkætlanin undir Leirvíksfirði fer at ganga væl*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ein av teimum, sum hevur drúgvastu royndirnar við tunnilsbygging í Føroyum, er Niclas Foldbo, verkfrøðingur, sum býr á Toftum. Hann hevur sum byggileiðari verið við til at bygt sjey tunlar og seinasta verkætlani, ið hann tók sær av sum byggileiðari, var tunnilin undir Vestmannasundi.

Niclas var byggileiðari, tá ið E. Pihl & Søn bygdi Leynatunnilin og Norðskálatunnilin, og hann var byggileiðari, tá ið Landsverkfrøðingurin bygdi teir tríggjar tunlarnar í Kalsoynni og Leirvíkstunnilin. At enda var hann eisini byggileiðari, tá ið P/F Vágatunnilin stóð fyri størstu verkætlanini innan samferðslukervið í Føroyum, nevniliga at byggja fast samband millum Streymoy og Vágoy.

### Góðar vónir

Hansara royndir við tunnilsbyggingum skorta tí ikki, og Niclas hevur tískil eisini verið við, tá ið "manuella" luftboringin varð avloyst av hydrauliskari og dátustýrdari boring.

– Jú, eg havi gott mót um byggingina av undirsjóvartunlinum undir Leirvíksfirði. Teir eru komnir í gott gróttilfar, og eg vænti, at góða "driftin" verður varandi, til komið er um fjørðin.

Maðurin við teimum drúgvu royndunum vísir til forkanningarnar, sum gjørdar eru, og hesar eru góðar, leggur hann dent á.

Undir vitjanini í Leirvík herfyri, skiltist, at bæði byggiharrin, sum er P/F Norðoyatunnilin og arbeiðstakarin, sum er Føroya Konsortiið, vænta, at tilfarið undir Leirvíksfirði verður uppaftur betur enn tilfarið undir Vestmannasundi.

So, her eru í løtuni øll útlit til, at farleiðin, sum fer at knýta Norðoyggjar at meginøkinum, verður enn ein "drønandi succes", sum fyrrverandi løgmaður tók til um tunnilin undir Vestmannasundi, eftir at hann hevði latið fyrsta skotið av í Leirvík.

### Luft og hydraulikkur

Niclas Foldbo sigur, at broytingarnar við útbúnaðinum til tunnilsbyggingar hava verið stórar, síðan hann í síni tíð byrjaði sum byggileiðari.

– Teir fyrstu tunlarnir vórðu boraðir við luft, sum hann tekur til. Hydraulisku boringarnar byrjaðu í 1978, tá ið tunnilsbyggingarnar í Kalsoynni fóru fram. Í dag verður framvegis borað við hydraulikki.

Hann sigur, at tá ið Norðskálatunnilin varð bygdur, var alt meira at kalla eftir eygamáti – og í hvørjum einstøkum føri varð mett um, hvussu borast skuldi, og hvussu borurin skuldi stýrast.

– Nú er boringin dátustýrd, soleiðis at borivognurin veit ítøkiliga, hvar hann skal seta borin, og hvussu borast skal, sigur Niclas Foldbo.

Hann vísir á, at fyrstu ferð, borað hevur verið í báðum endum samstundis, var, tá ið tunnilin undir Vestmannasundi varð bygdur. Hinvegin hevur verið vanligt at gera benið klárt, har tunnilin kemur útaftur.

### Rein matematikk

Mong eru ivaleyst tey, ið undrast yvir, at tað ber til at bora í báðum endum og síðan "raka" saman uppá sentimeturin, tá ið teinurin er náddur – og enntá mitt undir havbotninum.

– Men hetta er eingin trupulleiki. Hetta er tann reina matematik saman við góðum tólum, sigur Niclas Foldbo, sum hendan dagin, vit hittu hann í Leirvík, var ein túr og skoðaði gongdina í Norðoyatunlinum.

Eftir vitjanina í tunlinum, var hann styrktur í trúnni á, at henda stóra verkætlan fer at ganga væl.



*Útgerðin er nógv broytt. Í 1978 varð luftboringin skift út við hydrauliska og dátustýrda boring*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Undirskriva sáttmála um samanlegging hóskvøldið

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi hóskvøld klokkan 19.30 verður sáttmálin um kommunusamanlegging millum Oyndarfjarðar-, Skála- og Runavíkar kommunu undirskrivaður í býráðssalinum í Saltangará.

Samanleggingin verður veruleiki frá 1. januar 2005 at rokna, men fara kommunurnar fram til samanleggingina at hava tætt samarbeiði um øll mál.

– Tað eru sløk hálvt triðja ár, síðan Skála kommuna og Runavíkar kommuna undirskrivaðu sáttmála um samanlegging, og síðan tá hava kommunurnar báðar virka í tøttum samstarvi.

Samlaða fólkatalið í hesum trimum kommununum, sum nú fara at undirskriva sáttmálan um samanlegging hóskvøldið, var á nýggjárinum 3.523.



*Samlaða fólkatalið í teimum trimum kommununum – Skála kommunu, Oyndarfjarðar kommunu og Runavíkar kommunu, sum fara at skriva undir sáttmála um samanlegging hóskvøldið, var á nýggjárinum 3.523.*